# Aftur á slóðina



*Spurnigurin um EFTA-limaskap kann føra Fólkaflokkin aftur at elta slóðina frá gamla fullveldislandsstýrinum. Fólkaflokkurin er aftur avgerandi í føroyskum politikki*

*Mynd: Bárður*

**– Skulu vit yvitaka øll tólv málsøkini í hesum valskeiðinum, so yvirtaka vit meira, enn undanfarna samgonga kláraði upp á seks ár, og tað er ivasamt, um vit megna tað, sigur Jørgen Niclasen**

POLITIKKUR
*Heri á Rógvi*
*heri@sosialurin.fo*

Fólkaflokkurin er sum ikki einaferð í einari lyklastøðu í føroyskum politikki. Eftir seks ár í fullveldissamgongu, so stevnir flokkurin nú moti einari heldur øðrvísi loysn í sjálvstýrisspurninginum sum partur av ABC samgonguni.

Sambært løgmanni og danska forsætisráðharranum eru tólv yvirtøkur avgerandi fyri, um EFTA føroyskur EFTA-limaskapur umvegis Danmark kann gerast veruleiki.

– Fólkaflokkurin er sinnaður at yvitaka øll hesi málsøkini, ger Jørgen Niclasen, formaður fyri tingbólkin hjá Fólkaflokkinum greitt. Men tað er kanska ikki realistiskt

– Skulu vit yvitaka øll tólv málsøkini í hesum valskeiðinum, so yvirtaka vit meira, enn undanfarna samgonga kláraði upp á seks ár, og tað er ivasamt, um vit megna tað, sigur Jørgen Niclasen

Sostatt skal ABC samgongan yvirhála fullveldislandsstýrið í yvirtøkum, sambært fyrrverandi landsstýrismanninum. Verandi samgonga kann í mesta lagi virka til januar 2008.

Jørgen Niclasen heldur, at tað ber til at yvirtaka skjótari, enn undanfarna samgonga megnaði.

– Tá glið kom á yvirtøkurnar í undanfarnu samgongu, so var tað kanska meira klandur enn nakað annað, sum merkti samgonguna, sigur Jørgen Niclasen.

### Halda samgonguskjal

Skal EFTA limaskapur gerast veruleiki eftir tí leisti, sum danski forsætisráðharrin og løgmaður tosaðu um á ríkisfundi, so skal víkjast frá samgonguskjalinum í sambandi við ætlaðu yvirtøkurnar.

– Vit halda okkum sjálvandi til samgonguskjalið. Og tí má samgongan seta seg niður fyri at vita, hvat vit kunnu gerast samd um. Í øllum førum ger tann nýggja yvirtøkulógin tað lættari, sigur Jørgen Niclasen.

Jørgen Niclasen heldur ikki, at tað ber til at siga, at málið við løgfrøðiligum fyrilitum verður súltað.

– Tá vit tosa um EFTA limaskap, so tosa vit um at fyrisita málsøki, sum ikki eru yvirtikin. Tí er tað ov bíligt í hesum førinum at tosa um, at vit bert við politiskum amboðum kunnu fáa limaskap, sigur Jørgen Niclasen.

### Cost-benefit

Formaðurin fyri tingbólkin hjá Fólkaflokkinum ávarar staðiliga ímóti, at hugt bert verður hugt eftir útreiðslunum í sambandi við yvirtøkurnar.

– Tað fer sjálvandi at kosta eitt sindur, men vit mugu eisini hyggja eftir, hvørjar fyrimunir og inntøkur ein EFTA limaskapur gevur Føroyum, sigur Jørgen Niclasen.

Enn er eingin ítøkilig kanning gjørd av, hvørjar møguligar inntøkur, ið ein EFTA limaskapur gevur føroyska samfelagum, men politisk semja tykist at vera um, at ein tílíkur limaskapur merkir umfatandi fyrimunir.

Sambært Jørgen Niclasen eru tað í fleiri førum ikki teir nógvu pengarnir, ið eru avgerandi fyri, um eitt málsøki kann yvirtakast.

– Taka vit eitt nú loftrúmið, so rinda flogførini sjálvi kostnaðin av hesum. Tað vil sostatt bert geva nøkur nýggj arbeiðspláss, sigur Jørgen Niclasen.

Av teimum tólv málsøkjunum vera níggju teirra mett sum fyrisitingarligar flytingar uttan stórvegis kostnað.

### Ikki ES

Fleiri atfinningar móti ætlaða EFTA limaskapinum og visión 2015 ætlanini hava snúð seg um, at Føroyar heldur skulu stremba eftir limaskapi í ES. Men tað verður ikki við Fólkafloksins vælsignilsi, at fast samband verður úr Tinganesi til Brússel.

– So leingi fiskivinnupolitikkurin hjá ES verður stýrdur úr Brússel, so er Fólkaflokkurin ímóti føroyskum ES-limaskapi, ger Jørgen Niclasen greitt.

## Tað næstbesta

**Fólkaflokkurin sær ætlaða leistin hjá forsætisráðharranum í sambandi við Norðurlandaráðið sum næstbestu loysnina, ið kortini kann koma upp á tal**

POLITIKKUR
*Heri á Rógvi*
*heri@sosialurin.fo*

Um tú ikki fært tann, tú elskar, so mást tú elska tann, tú fært.

Hetta er ikki almenna áskoðanin hjá Fólkaflokkinum til ABC samgonguna, men heldur ein passandi útlegging av støðuni hjá flokkinum til støðuna hjá Føroyum í Norðurlandaráðnum.

– Vit ynskja fullan limaskap. Àðrenn vit gera nakað meira í málinum, eiga vit at royna hendan møguleikan. Ber hetta ikki til, so má leisturin hjá forsætisráðharranum metast sum tað næstbesti møguleikin, sum tað ljóðar, sigur Jørgen Niclasen, formaður fyri tingbólkin hjá Fólkaflokkinum.

Fólkaflokkurin stendur tískil í einum slag av bíðistøðu. Men Jørgen Niclasen avvísir ikki, at flokkurin fer at taka undir við leistinum hjá Anders Fogh Rasmussen, forsætisráðharra.

– Tað er serliga avgerandi, hvat Norra, Svøríki og Finnlandi siga í Norðurlandaráðnum. Tey skulu eisini taka fyrilit fyri støðuni hjá sámunum, sigur Jørgen Niclasen.

### Einki nýtt

Sum nevnt í blaðnum í gjár avgjørdi eitt samt løgting í 18. mars 2003, at Føroyar skulu royna at fáa fullan limaskap í Norðurlandaráðnum. Málið varð eisini reist á fólkatingi í fyrispurningi til Anders Fogh Rasmussen av Høgna Hoydal, fólkatingsmanni. Fyrispurningurin varð svaraður fyrst í juni mánaði, og tá gjørdi danski forsætisráðharrin greitt, at danska stjórnin vildi ganga við til, at Føroyar fingu eina støðu í Norðurlandaráðnum, ið líktist fullum limaskapi, men fullur limaskapur kom ikki upp á tal við verandi ríkisrættarligu støðu. Og hesa støðu hava danir framvegis.